# So er AB uppi

**Tá Royn hevði tapt leygardagin, var spenningurin ikki hin stóri á Argjum, men frøin á leikarunum var tó sjónlig, tá uppflytingin varð staðfest sunnudagin**

UPPFLYTING
*Jákup Mørk*

Tað hevur ligið í kortinum tað mesta av kappingarárinum, at tað skuldi eydnast AB at vinna seg upp í aðru deild fyri fyrstu ferð í søgu felagsins.

Longu undan kappingarárinum var greitt, at hópurin var munandi styrktur, sammett við tann, sum hevði verið partur av oddastríðnum í triðju deild tey bæði seinastu árini, og longu eftir fyrstu umførini stóð greitt, at argjamenn meintu tað í álvara hesaferð, tá tosað varð um uppflyting.

Tá fýra umfør vóru eftir at spæla høvdu argjamenninir bert tørv á einum stigi afturat, áðrenn uppflytingin varð vissað, og hetta skuldi so fáast til høldar, tá gøtumenn komu á vitjan sunnudagin.

Tað var tí eitt sindur keðiligt hjá AB, at toftamenn longu leygardagin skuldu basa Royn, sum annars vóru næstir á talvuni. Við hesum hevði AB tryggjað sær uppflytingina longu undan dystinum móti GÍ, og tað mundi líka sum taka broddin av spenninginum, tó at hetta ikki vikaði avrikið hjá AB ígjøgnum kappingarárið.

Tí gjørdist dysturin móti gøtumonnum ikki eins spennandi, sum hann kanska átti at verið. Nervin, sum annars hevði verið í hæddini, var at kalla ikki til staðar, nú uppflytingin var avgreidd, men tað eydnaðist tó heimaliðnum at spæla seg til hópin av málmøguleikum, tó at hetta einki úrslit gav fyri steðgin.

Eftir steðgin brast tó fyri nev, tá fyrst Hans Jørgen Djurhuus og síðani Eyðun Dalsgarð sendu bóltin í netið, og so var klárt at feira uppflytingina.

Sum vera man, so varð nógv gjørt burturúr, nú felagið fyri fystu ferð hevur vunnið seg úr triðju deild. Formaðurin í felagnum, Tórálvur Stenberg, helt røðu, og tað sama gjørdu umboð fyri AB-stuðlar, so tað var akkurát soleiðis, sum tað átti at vera.

Tó at okkurt helst varð gjørt sunnukvøldið, so má sjálv uppflytingarveitslan bíða nakrar vikur afturat. Enn eru tríggir dystir eftir at spæla, so tað verður ikki fyrr enn seinasta vikuskiftið í hesum mánaðinum, at veruliga veitslan verður, og einki er at ivast í, at Róðrarneystið á Argjum verður fullsett til ta tíð.



*Sum tað sømir seg einum uppflytara, so fekk AB-venjarin, Sámal Erik Hentze, ein rættiligan lufttúr, nú hann fyrsta árið sum venjari hevði rokkið setninginum um uppflyting*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Sjampanjusrproyt og gull-littir skógvar vóru sjálvsagdir gestir á vøllinum hendan dagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Blómur og annað skreyt hoyra eisini til eina uppflyting. Her er tað formans-sonurin, Johan Stenberg, sum tekur ímóti. Sámal Erik Hentze og eldri sonurin, Torkil, hyggja at*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



# Eru nóg góðir til superliguna

**- Eg havi bert verið stutta tíð í Føroyum, men tað er mín sannføring, at allir teir 25 í føroyska landsliðshópinum eru nóg góðir til donsku superliguna. Teir hava vilja, talen og vildu verið ein vinningur í donskum fótbólti, um teir sloppu at venja meira, enn teir gera í Føroyum**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*



*Føroysku landsliðsleikararnir kundu hvør sum ein staðið seg í donsku superliguni, eru greiðu boðini frá føroyska landsliðsvenjaranum, Henrik Larsen, í samrøðu við Ekstra-Blaðið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Í danska Ekstra Blaðnum er týsdagin stór samrøða við føroyska landsliðsvenjaran, Henrik Larsen, og orðini omanfyri eru tikin úr greinini, sum týsmorgurnin kundi lesast á alnetisútgávuni hjá blaðnum.

Hetta sýnir í øllum førum, at føroyski landsliðsvenjarin hevur álit á sínum leikarum, men samstundis líkist hetta eisini einum ynski um, at venjarin fegin hevði vilja, at fleiri av hansara leikarum spældu yrksfótbólt uttanlands, og á tann hátt ment seg sum fótbóltsleikarar.

Ikki minst tykist hetta vera galdandi fyri kropsligu venjingarstøðuna hjá leikarunum, og Henrik Larsen er eisini hampuliga bersøgin, tá tosið í Ekstra-Blaðnum fellur inn á føroysku kappingina.

- Tað er bara so, at føroyska kappingin liggur still helmingin av árinum, og tað er helst størsta orsøkin til, at Føroyar av og á eru fyri rættiligum avsmurningi, tá landsdystir verða spældir.

- Høvdu vit bara spælt ein tíma hvørja ferð, kundu vit ivaleyst spælt upp ímóti teimum flestu tjóðunum, men seinasta hálva tíman eru kreftirnar sum oftast uppi. Tað er revsingin fyri at liva og spæla sum áhugaleikarar í Føroyum, staðfestir venjarin.

### Fáir standa seg

Hetta kundi eisini líkst einari áheitan frá Henrik Larsen til starvsfelagar sínar í Danmark um, at tað kundi verið eitt gott hugskot hjá hesum at vent eyguni móti Føroyum í royndunum at styrkja um lið síni.

Tað skal tó í hesum sambandi nevnast, at av teimum, sum í dag eru aktuellir til landsliðið, eru tað bert Jákup Mikkelsen og Todi Jónsson, sum hava staðið seg væl í bestu donsku deildini. Báðir hava teir sum kunnugt verið danskir meistarar, men meðan Jákup í dag situr á beinkinum hjá Molde, er Todi ikki tøkur hjá landsliðsvenjaranum.

Christian Høgni Jacobsen hevði ilt við at vinna sær plás, tá Vejle seinasta kappingarár spældi í superliguni, og Óli Johannesen megnaði ikki at spæla seg til fast pláss hjá AGF, og hevði ikki hepni við at finna sær eitt danskt felag úr bestu deildini, tað hálva árið, sum hann stóð á sølulistanum í Hvidovre.

# Vogts kemur við frágreiðing

**Skotski landsliðsvenjarin kennir seg noyddan at koma við skrivligum innleggi í skotskum bløðum, so hann kann greiða frá truplu støðu sínari**

LANDSDYSTURIN
*Jákup Mørk*



*Berti Vogts heldur skotsku miðlarnar vera óvanliga stuttmintar, nú teir vilja hava fleiri av landsliðsleikarunum settar av liðnum*

Eftir at hava hugt nakrar ferðir at sjónbandinum av landsdystinum á Svangaskarði, hevur Berti Vogts nú endiliga loyst frá posabandinum. Fyrst og fremst er hetta gjørt, tí hann kennir seg illa viðfarna í skotsku miðlunum, har hann ikki sigur seg hava fingið ført síni sjónarmið fram.

Um sjálvan dystin sigur hann eins og áður, at hann framvegis ikki er greiður um, hví skotska liðið spældi, sum tað gjørdi, fyrstu trý korterini av dystinum móti Føroyum.

- Hetta er tað, sum kann henda, tá tú spælir við nógvum ungum og óroyndum leikarum, men tað fær ikki meg at broyta áskoðan um, at tað er neyðugt við eini stórari útskifting á skotska landsliðnum. Ein útskifting, sum skuldi verið gjørd leypandi, men sum ongan tíð varð gjørt.

### Fimm í verjuna

Víðari skrivar Berti Vogts, at hann heldur skotsku miðlarnar vera óvanliga stuttmintar, tí tá hann tók við sum venjari, var tað mest sum eitt krav, at nú skuldu allir teir gomlu leikararnir, sum høvdu verið við alt ov leingi, skiftast út.

- Tit kunnu ikki rokna við, at alt bara riggar frá fyrsta degi. Mín trupulleiki er, at skotskir leikarar ikki verða nýttir nóg nógv í skotskum og bretskum fótbólti. Ístaðin verða teir vandir við altjóða fótbólt á landsliðnum, og tað er skeivi vegurin at fara. Tað skuldi heldur verið so, at spælararnir fingu royndirnar í felagi sínum, og síðani komu á landsliðið.

Annars snýr størsti parturin av greinini hjá Vogts seg um, hví hann hevði tikið liðið út, so sum hann gjørdi, og yvir høvur tykist hann halda hondina yvir sínum leikarum, tó at hann sigur, at har vóru ein ella tveir, sum prógvaðu, at teir ikki eru nóg góðir til landsliðið.

Fyri føroyingar er kanska stuttligt at síggja, at Vogts á Svangaskarði hevði styrkt eitt sindur um verjupartin, men at hann nú viðgongur, at hesin parturin kanska skuldi verið styrktur enn meira.

- Mín ætlan hevur alla tíðina verið, at vit skulu spæla við trimum í verjuni. Móti Føroyum hevði eg tó valt at spæla við fýra, so vandin fyri kostnaðarmiklum mistøkum skuldi minka. Í bakspeglinum síggi eg, at hetta ikki var nóg mikið, men hvør av okkum vildi trúð undan dystinum, at tað skuldi verið neyðugt at spælt við fimm monnum í verjuni, til tess at halda føroyska álopsspælinum burturi, sigur Berti Vogts at enda í grein sínari.

Greinin kann lesast í fullum líki á slóðini, www.dailyrecord.so.uk/spo rt

# Norðurlond ikki sannførandi

**Men tað var ikki heilt við síðuna av hjá Danmark og Svøríki, sum greiddu javnleik á útivølli**

EM UNDAN-KAPPING
*Jóannes Hansen*

Í summar vóru bæði Danmark og Svøríki við í HM endaspælinum í Suðurkorea og Japan. Tað kann væl vera, at fleiri av brøðratjóðum okkara fara at vera uppií, tá fimtan europeiskar tjóðir saman við vertunum fara at dystast í EM endaspælinum, sum á sumri 2004 verður í Portugal. Men einki norðurlendskt land vann, tá fyrsta umfar í undankappingini var á skránni leygardagin.

Danmark var í Noregi. Úrslitið var 2–2. Undan dystinum var nógv tosað og skrivað, og tað hevur tað eisini verið eftir dystin. John Carew, sum var settur á vøllin í 2. hálvleiki, javnaði í 93. minutti til 2–2. Jon Dahl Tomasson legði tvær ferðir Danmark á odda, eftir at fyrrverandi liðfelagin hjá Toda Jónsson, Niclas Jensen, sum nú spælir í Manchester City, frágera væl hevði spælt hann leysan dygst undir málinum. John Arne Riise úr Liverpool skoraði fyrra málið hjá Noregi.

Merkisvert var tað, at eingin spælari úr donsku superliguni var á vøllinum.

Í donsku pressuni hevur verið funnist at danska avrikinum, sum ikki varð hildið at vera serliga sannførandi – hvørki í verju ella álopi. Danski venjarin, Morten Olsen, heldur atfinningarnar vera tað bera tvætl og vísir á, at tað altíð er torført at spæla ímóti liðum, sum eru so primitiv í spælistíli, sum hann heldur Noreg vera.

Í Noregi eru teir, sum vera man, ikki so glaðir fyri danska venjaran, sum teir halda vera hástóran. Ábyrgdarpersónar kring norska liðið verða í norsku pressuni endurgivnir fyri at siga, at Morten Olsen hevur ikki skil fyri fótbólti, tá hann sigur, sum hann ger. Víst verður á, at Noreg hevði nógv meiri spæl og nógv fleiri møguleikar, enn Danmark hevði.

### Svøríki framvegis ósigrað

Sviar vóru í Riga, sum heilt síðani víkingatíðina hevur havt nógv samband við norðurlendsku tjóðirnar.

Svøríki kom hesa ferð til hús við málleysum javnleiki. Hetta var kanska minni, enn teir høvdu vónað, men dystargongdin var soleiðis, at sviar skulu vera nøgdir. Letland hevði serliga í 2. hálvleiki nógv spæl, og í 65. minutti rakti Marian Pahars í stólpan.

Merkisvert er tað, at nú hevur Svøríki spælt seytjan undankappingardystir, uttan at teir hava tapt, og venjaraparið Tommy Söderberg og Lars Lagerbäck hevur framvegis ikki roynt at tapa í undankapping.

Finnland legði fyri við heimadysti ímóti Wales, sum ongantíð hevur verið við í nøkrum endaspæli, og sum avgjørt ikki telist millum fremstu fótbóltstjóðirnar í Europa. Tí var tað satt vónbrot fyri finnar, at teir taptu 2–0 á olympiska leikvøllinum.

Ísland hevði fríviku-skifti. Fyrsti dysturin hjá teimum verður á heimavølli leygardagin 10. oktober. Grannar okkara fyri vestan hava nógv at liva upp til, tí teir skulu spæla ímóti Skotlandi!